


# Mótmælið hjá Greenpeace liðugt

**Jan Müller**

29.05.2014 - 09:55

Oljan.fo

Greenpeace-átakið ímóti Statoil-pallinum Transocean Spitsbergen er av. Mótmælisfólkini, sum tóku seg upp á pallin týsmorgunin, valdu at fara av honum aftur, eftir at norska løgreglan hevði givið teimum boð um tað.

Løgreglan kundi tó ikki fara upp á pallin, fyrr enn myndugleikarnir á Marshalloyggjunum høvdu sagt ja, tí Transocean Spitsbergen er skrásettur har. Harumframt var pallurin staddur í altjóða sjógvi, og har hava norskir myndugleikar ikki ræðisrætt. Men tá myndugleikarnir á Marshalloyggjunum bóðu Noreg um hjálp at til fáa Greenpeace-fólkini av pallinum,metti norska løgreglan seg hava rætt til at fara upp á pallin.

Løgregluovastin í Troms, Ole Sæverud, sigur við norska kringvarpið, at alt gekk friðarliga fyri seg, tá Greenpeace-fólkini fóru av pallinum.

Transocean Spitsbergen er staddur í landssynning úr Bjarnoynni. Hann er á veg til Hoop-leiðina, har hann skal bora fyri Statoil.

Greenpeace-fólkini, sum vóru á pallinum, eru úr Danmark, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Filipsoyggjunum.